Fylgiskjal 23

**HAVBÚNAÐARFELAGIÐ**

**Heilsu- og Innlendismálaráðið**
**himr@himr.fo**

Tórshavn, 28 Mai, 2018

Okkara tilv./Our ref.
4989-488/Niels /Havbxn-HBF-B
Tykkara tilv./Your ref. 17/00872-54

## Ummæli av uppskoti til náttúrumargfeldislóg

Havbúnaðarfelagið takkar fyri møguleikan at ummæla uppskotið til nýggja náttúrumargfeldislóg. Havbúnaðarfelagið hevur hesar viðmerkingar:

**Alment:**
Tað er torført at ummæla uppskotið til náttúrumargfeldislóg, tí ávirkanin av uppskotinum verður í stóran mun tengd at, hvussu stevnumiðini og heimildirnar í lógini verða umsitnar í praksis. Fyri føroyskan havbúnað er tað umráðandi, at tey umhvørviskrøv sum verða sett, eru rímulig (proportional), saklig, og grundað á vísindaliga vitan. Tað er tí umráðandi, at neyðug orka verður til at umsita lógina, herundir at orka er til at savna neyðugu vitanina.

Eisini er ávirkanin av lógini treytað av, hvat innihaldið verður í teimum kunngerðum, sum skulu smíðast við støði í lógini. Havbúnaðarfelagið ynskir at verða tikið við uppá ráð, tá hesar kunngerðir skulu smíðast, so tað kann tryggjast, at óneyðugir trupulleikar ikki verða í s.v. íverksetanini av nýggjum reglunum.

Gildiskomuásetingar tilskila, at landsstýrisfólkið við kunngerð ásetur, nær lógin ella partar av henni fáa gildi. Tað er umráðandi, at avgerðir um gildiskomu verða tiknar í tøttum dialogi við tey, sum verða ávirkaði av hesum. T.d. kann nevnast, at tað sambært uppskotinum krevst serligt loyvi til at taka vill súgdjór, herundir eisini kóp sum ger seg inn á alibrúk. Tí kann tann ásetingin ikki fáa gildi fyrr enn ein ætlan er gjørd fyri hvussu henda broytingin skal útinnast í praksis.

**Serstakar viðmerkingar:**

**§ 8, stk. 2:** Ásett verður, at myndugleikarnir skulu leggja dent á vitan, sum er "grundað á royndir hjá ættarliðum". Hvørki í lógarteksti ella viðmerkingum verður tó útgreinað, hvørja vitan sipað verður til, ella hvussu hon verður staðfest. Í norsku náttúrumargfeldislógini, sum er fyrimynd fyri hesum lógaruppskotinum, verður sum skilst við hesari lógarásetingini serliga sipað til royndir hjá samum. Spurningurin er, um tað er neyðugt at hava slíka áseting í føroysku lóggávuni, tí tað er undir øllum umstøðum eitt vanligt fyrisitingarligt prinsipp, at

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo

myndugleikin hevur skyldu til at upplýsa málið á nøktandi hátt. Í hesum sambandi kann myndugleikin taka ta vitan og royndir við, sum eru viðkomandi fyri málið.

**§ 60:** Henda greinin hevur eina heimild at áseta krøv um innaneftirlitsskipanir. Tað er tó ikki greitt, hvørki í lógarteksti ella viðmerkingum, hvørjum henda grein er ætlað. Tað eigur at verða útgreinað í viðmerkingunum, hvør ætlanin við hesari greinini er.

**§ 72:** Í hesari greinini verður § 11 í alilógini broytt, so hon vísir til nýggju náttúrumargfeldislógina heldur enn verandi náttúrfriðingarlóg. Henda broyting eigur tó at verða gjørd samstundis sum viðkomandi ásetingar í nýggju náttúrumargfeldislógini verða settar í gildi.

Vinarliga
Havbúnaðarfelagið

Niels Winther

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo